


Lýsing úr Sosialinum 28 mars




Lýsing í Sosialinum ímorgin

# FaroeJet broytir lýsingar

**Nýggja føroyska flogfelagið FaroeJet fer í nýggjum lýsingum at hava heildarprísin á flogseðlunum. Kappingarráðið hevur kontaktað tey, og álagt teimum at broyta prísin so at tað verður týðilligari fyri kundan**

FLOGFERÐIR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Mánadagin hevði nýggja føroyska flogfelagið FaroeJet tíðindafund, har kunngjørt var fyri prísum og viðurskiftunum hjá flogfelagnum. Sama dag vóru lýsingar í bløðunum, har felagið hevur einvegis prísir fyri 500 og 695 krónur pluss avgjøld, sum var skrivað við lítlari skrivt longri niðri á síðuni. Rætti prísurin verður tá fyri 695 krónur ferðaseðillin – 1.085 millum Vágar og Keypmannahavn og 925 millum Keypmannahavn og Vágar. Tað vil siga 2.010 krónur tilsamans fyri ein ferð aftur og fram til Keypmannahavnar.

Hetta heldur Kappingarráðið er at villleiða kundan.

–Kundin er áhugaður í endaprísinum, tey eru ikki áhugað at vita, hvussu prísurin er samansettur, sigur Terje Sigurðsson á Kappingarráðnum.

Hann váttar, at Kappingarráðið hevur sett seg í samband við FaroeJet, tí at teir ikki meina, at prísssetingin hjá teimum fylgir teimum reglugerðum, sum eru um prísmerking.

Í reglunum um prísmerking stendur millum annað hetta: *»Prísmerking skal vera týðulig, so at skilligt er, til hvørja vøru prísmerkingin vísir. Tað skal vera lætt at síggja prís á vøru og tænastu á sølustaðnum. Eru fleiri enn ein prísmerking á einari vøru, skal tað vera sjónskt hvønn prís, ið brúkarin skal gjalda. Tann uppgivni søluprísurin skal vera endaligur og meirvirðisgjald íroknað. Um aðrar útreiðslur leggjast afturat søluprísinum, skal tað tilskilast serliga.«*

### Trupult at fylgja

Terje Sigurðsson meinar tó at tað er trupult hjá flogfeløgum at fylgja hesi reglugerð til punkt og prikka eftirsum at prísurin er ymiskur alt eftir hvørjum flogvølli ein flýgur frá.

Tí verður eisini viðhvørt tikið til undantakið, sum er í reglugerðini fyri prísseting.

– Vit hava havt samskifti við Atlantic Airways um hetta í fjør, tá teir gjørdu sama feil sum FaroeJet, og tí eru teirra lýsingar nú við rætta prísinum, sigur Terje Sigurðsson.

Atlantic Airways hevði ígjár lýsingar í bløðunum við Føðingardagstilboði - 1560 krónur aftur og fram við øllum. Hetta tilboð er 60 krónur bíligari enn tilboðið hjá FaroeJet, sum er 1000 ferðaseðlar fyri 500 krónur - men sum eftir røttum, tá alt er við er 1620 krónur.

– Nú fara vit at upplýsa heildarprísin. Tað verður ein prísur úr Vágum til Keypmannahavn og ein annar úr Keypmannhavn til Vágar. Nógv meiri innviklað meina vit, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri á FaroeJet.

Orsøkin til, hví FaroeJet lýsti sum tey gjørdu í byrjanini var, at tað er hesin háttur, íð verður brúktur allastaðni uttanlands, siga tey á FaroeJet.




*Atlantic Airways lýsur við prísum har alt er íroknað.*

# Sølan av FaroeJet gongur strálandi

**Allar sjey ferðaskrivstovur, sum selja FaroeJet lata sera væl at søluni.**
**–Vit hava sitið aftan á arbeiðstíð og roynt at tikið okkum av øllum bíleggingum, sigur Steinvør Fonn á Fonn Flog**

FLOGFERÐIR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Nú hevur verið gjørligt at keypa ferðaseðlar hjá FaroeJet í tríggjar dagar og higartil gongur tað sera væl. Tær sjey ferðaskrivstovurnar, Alpha Travel, Green Gate Incoming, Faroe Travel, Flogfelag Føroya, Fonn Flog og VikuTur, sum í løtuni selja FaroeJet, eru á einum málið um at sølan hevur fingið eina góða byrjan.

– Tað plagar at ringja nógv hesa tíðina á árinum, men nú ringir tað eyka nógv, sigur Dánial Poulsen á Faroe Travel.

Tað eru ikki bara tilboðsferðirnar, sum verða seldar uttan fólk bíleggja eisini ferðir til alt summarið.

– Summi biðja útilukkandi um FaroeJet, tá tey bíleggja sína ferð, siga tey á Flogfelag Føroya.

### Barnasjúkur

Men eitt sindur av barnasjúkum hava eisini verið. Nakrar av ferðaskrivstovunum siga, at fyrsta dagin var ógjørligt at koma inn á heimasíðuna at bíleggja. Og mikudagin, tá Sosialurin var í sambandi við ferðaskrivstovurnar, klagaðu nakrar av teimum um at trupulleikar enn vóru við at bíleggja ferðir.

– Tað er eitt sindur av roksi við heimasíðuni, og tá mugu vit skriva upp fyri hond, siga tey á Fonn Flog í Klaksvík.

Tey sum bíleggja eina flogferð við FaroeJet fáa ikki ein vanligan ferðaseðil, uttan eitt nummar sum verður víst, tá ein chekkar inn á flogvøllinum.